# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jógvan Jákup Gardar**, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Nordborg í Danmark, andaðist hvítusunnudag í Norðborg, 67 ára gamal.

**Thorstein Johannesen,** ættaður úr Hvalvík, búsitandi á Fyn, andaðist fríggjadagin 74 ár. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14 úr Vissenbjerg kirkju. Tey, ið vilja minnast Thorstein, kunnu lata eina gávu til Dansk indremissjón.

**Niels Hansen, Klaksvík,** andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hvítusunnuaftan, 38 ára gamal. Farið verður úr Kapellinum mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Niels, kunnu lata eina gávu á konta í peningastovnunum.

# Marnar og Árni í Runavík

Eitt mentanartiltak verður á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi týskvøldið, har tvíburarnir Marnar og Árni Andreasen fara at syngja og spæla.

Mentanartiltøkini á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi halda fram. Í samband við at 25 ár eru liðin, síðan heimið varð tikið í nýtslu, verður skipað fyri fleiri ymiskum almennum mentanartiltøkum á heiminum. Í kvøld 2. juni kl. 19.30 syngja og spæla brøðurnir tvíburarnir Marnar og Árni Andreasen í kantinuni á heiminum.

Mentanartiltakið er tað fjórða av fleiri. Fyrsta tiltakið var 24. mars, tá Kingobólkurin úr Tjørnuvík sang, næsta tiltakið var 22. apríl, tá sangkreftir úr Fuglafirði sungu, triðja tiltakið var mikukvøldið 22. mai, tá Dansifelagið á Látrinum á Eiði framførdi dans og dansispøl. Nú er tað so tvíburarnir Marnar og Árni Andreasen, sum fara at syngja og spæla.

Aftaná mentanartiltakið týskvøldið verður møguleiki at keypa sær ein kaffimunn. Tiltakið er alment, og øll eru vælkomin.



*Tvíburarnir Marnar og Árni Andreasen*

# Linda syngur í Tivoli



Í kvøld, týskvøldið 2. juni, frá kl. 18.45 syngur X Factor vinnarin Linda Andrews á "Plænen" í Tivoli í sambandi við nýggju fløguna "Into The Light", sum kemur út í dag.

*www.tivoli.dk*

## Rætting

Vit skrivaðu fríggjadagin, at Linda fekk fimm stjørnur frá ungdómsblaðnum VI UNGE, men tað var ein misskiljing. Talan var um eina raitingskipan, har lesarin hevur møguleika at geva greinunum stjørnur. VI UNGE hevur ikki ummælt fløguna, sum kemur á gøtuna í dag 2. juni.

*-red*

# Klaksvíkskvinnur í SMS



*Tær fimm sum hava listaframsýning í SMS f.v.: Gull-Britt Hansen, Lydia Petersen, Sigga Petersen, Astrid Mouritsen og Dagny Tróndheim*

Í døgunum 2. til 6. juni hava fimm kvinnur listaframsýning á Torginum í SMS.

Tær fimm eru: Dagny Tróndheim, Astrid Mouritsen, Sigga Petersen, Gull-Britt Hansen og Lydia Petersen. Tær hava allar málað í fleiri ár og luttikið á ymiskum felagsframsýningum, eins og tær hava sýnt fram sjálvar og tvær og tvær. Felags fyri tær allar fimm er at tær eru úr Klaksvík.

Talan er um eina søluframsýning, og málningarnir eru flest allir í akryl.

**Dagurin**
**2. juni. Marcellinus**, prestur í Róm, sum varð hálshøgdur umleið ár 300.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*